## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálp tá elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Finnur Lómstein**

andaðist og varð jarðaður.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jórun, Dora, Birgit, Anna og Erika**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona mín, mamma, vermóðir og omma okkara

**Marjun Petersen**
Tórshavn

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum sendu blómur, kransar og peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini og tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
**Jallgrímur, Sámal og Óli**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu okkum samkenslu í stóru sorg okkara, tá elskaði sonur, bróðir og svágur okkara

**Niels Holm Johannesen**
**vanliga nevndur Homm**

so brádliga varð tikin frá okkum.

Tøkk til Berg Debes Joensen fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk øll tit, sum hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið, og sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Ninna og Jason**

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2


# Jóhannes Olsen setti spakan í

**Heðin Zachariassen, bygdaráðsformaður í Hvalvíkar kommunu, sigur, at tað verða 32 búpláss í nýggja stovninum, og fyribils metingar siga, at samlaði kostnaðurin fer at liggja um 37 milj. krónur**

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Jóhannes Olsen, fyrrverandi bygdaráðsformaður í Hvalvíkar kommunu, sum klokkan 15 hósdagin setti fyrsta spakan í til bygging av Ellis-og Røktarheimi í Streymnesi.

Jóhannes er nevniliga elsti fyrrverandi bygdaráðsformaður í økinum, og tí avgjørdu kommunurnar, sum eru saman um byggingina, at hann skuldi fáa tann heiður at seta spakan í.

Kommunurnar, sum standa saman um byggingina, eru Hósvíkar kommuna, Hvalvíkar kommuna, Saksunar kommuna, Haldórsvíkar kommuna, Sunda kommuna og Gjáar kommuna.

### 32 búpláss

Heðin Zachariassen, bygdaráðsformaður í Hvalvíkar kommunu, sigur, at tað verða 32 búpláss í nýggja stovninum, og fyribils metingar siga, at samlaði kostnaðurin fer at liggja um 37 milj. krónur.



*Tað var Johannes Olsen, sum loysti fyrsta flagið fyri Ellis-og Røkarheiminum í Streymnesi. Hann er elsti núlivandi og fyrrverandi bygdarráðsformaður í Sundalagnum. Sambært ætlanini, stendur heimið, sum fer at rúma 32 búfólkum, liðugt tíðliga í ár 2006*

Tað er Albert Isfeldt, sum hevur teknað Ellis-og Røktarheimið í Streymnesi, og saman við Landsbyggifelagnum standa teir aftan fyri alt arbeiði.

- Í løtuni verður arbeitt við at gera útbjóðingartilfarið klárt, og ætlanin er at bjóða byggingina út tíðliga í komandi ári.

Heðin Zachariassen sigur, at sambært byggiætlanini, stendur Ellis-og Røktarheimið í Streymnesi klárt at taka í nýtslu tíðliga í ár 2006.


Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



FRUMFRAMVÍSING av fleiri spildurnýggjum bilmodellum

Í hesum sambandi hava vit opið hús í dag 18. oktober frá kl. 11.00 - 16.00 og eisini sunnudagin 19. oktober frá kl. 14.00 - 17.00





Komið og roynið okkara nýggju bilar!
Eisini hava vit nógv góð brúktbilatilboð, og vøruvognin júst til tín!
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo






*Á myndini síggja vit, fv. : Dávur Davidsen, Tjørnuvík, sum hevur verið bygdarráðslimur í Haldórsvíkar kommunu í eitt mannaminni, Johannes Olsen úr Hvalvík, sum er elsti núlivandi og fyrrverandi bygdarráðsformaður í Sundalagnum og Niels Andreas Mortensen, sum er formaður í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum*


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

VETRARTILBOÐ





1 vika í Danland
1 vika í Danland-íbúð í Blokhus, Hirtshals ella Ebeltoft
Tilboðið er galdandi frá 18.9. - 2003 til 27.3. - 2004
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
úr 5.995,-

1 vika á Pers Hotel
Frítíðardepilin Pers Hotel í Gol í 1 viku
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
5.000,-

Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
4.500,-





2 FYRI 1
Ferðist 2 og gjaldið fyri 1
fram og aftur í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað íroknað bil:
Til Danmarkar: 2.990,-
Til Noregs: 2.380,-
Til Hetlands: 1.790,-

Hetland-Cruise við hotelli
Hósdag - Mánadag: 1.500,-
Mánadag - hósdag: 1.000,-

Mini-Cruise úr 600,-
Til Danmarkar ella Noregs

SMYRIL LINE